# Minningarhaldið

## Og dansurin gongur

**Í 1958 skrivaði skaldið Tummas Napoleon Djurhuus hesa yrking, sum var vígd minninum um teir. sum fórust við Stella Argus.**

*Stormdunið inn yvir bygdirnar stendur*
*– burtur er sóltíð og gaman –*
*í briminum uttast við úthavsins strendur*
*taka sjólætnir hendurnar saman.*

*Stíga ein dans við so havtungum stevi,*
*aldar í ringinum víða*
*av teimum, ið reistir av vátari legu*
*ein dans í brotunum stíga.*

*Og inn yvir mannabústaðir stendur*
*í brotum eitt havborið kvæði*
*– andlit læsast í ótta, og hendur*
*faldast í síðsvørtum klæði.*

*Oyruni nema ein farra av sálmum*
*– bátar og segl fóru undir –*
*ívovið ljóði frá svíkjandi málmum,*
*tá jarnsnekkjan liðar seg sundur.*

*Og dansurin gongur, oyrað nemur*
*– nema í hvørjari smáttu –*
*í kvæðinum, inn yvir bygdirnar kemur*
*málið á einum, tey áttu*

*Og kvæðið gongur – stevtungar fjøldir*
*halda hvør aðra í hendur –*
*kvæðið frá teimum, sum gjøgnum øldir*
*baldust við úthavsins strendur.*

*Og einaferð fara vit eisini sjálvi*
*– tá leiðin at enda er gingin –*
*við úthavsins strendur – í broti og gjálvi –*
*fara vit sjálv upp í ringin.*

*T. N. Djurhuus 1958*



*Minnisvarðin yvir manningina á Stellu Argus varð avdúkaður sunnudagin*

**Sum sagt varð frá í blaðnum í gjár fara vit at gera meira burtur úr minningarhaldinum í samband við avdúkingina av minnisvarðan fyri teir, sum fórust við Stella Argus fyri júst 50 árum síðani**

MINNINGARHALD
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Í seinastu Miðviku varð greitt frá hesi vanlukku, og tosað varð við nøkur av teimum avvarðandi. Í samband við minningarhaldið hittu vit fleiri av teimum avvarðandi og kunnu hava okkurt at leggja afturat.

Tað er eitt kent fyribrigdi, at fólk vóru sanndroymd ella at tey fingu okkurt "varsil", sum tey hava kunnað sett í samband við vanlukkuna. Tað eru eisini fleiri frásagnir í samband við Stella Argus um, at tað er meira millum himmal og jørð, enn vit skilja.

Í umrøddu Miðviku var eitt dømi um hetta, har Fritiof Petersen úr Kollafirði droymdi seg at vera umborð á Stella Argus, júst tá ið vanlukkan hendi.

### Katrina visti, at sonurin var sjólátin

Ein onnur frásøgn er henda:

Ein av teimum sum fórust var tann 22 ára gamli Jóannes Rasmussen úr Miðvági. Mamma hansara, Katrina, hevði eitt heilt serligt upplivilsi júst tann 27.oktober 1957, tá ið tað seinasta fræ ttist frá Stella Argus, at teir vóru farnir at sigla inn.

Forsøgan er tann, at inni hjá teimum búði Jóhanna í Kálvalíð, sum var gumma Jóannes.

Hendan dagin er Katrina farin at vitja systir sína. Á veg heim aftur til húsa gongur hon framvið tí gamla skúlanum, har tað eisini var lærarahús. Niðan til húsið var eitt portur. Sum hon í skýmingini kemur heim eftir, heldur hon seg síggja Jóhonnu koma ímóti sær. Men tá ið tær nærkast, snarar Jóhanna og fer niðan gjøgnum portrið. Hon letur tað so harðliga aftur, at mamman hoyrir tað smella. Hon skilir einki av hesum, men

### Røðan hjá Óla Jacobsen

Henda tíðin fyri 50 árum síðan var ein skakandi tíð, eisini hjá okkum, sum ikki vóru beinleiðis partur av sorgarleikinum, og sum minnast so langt aftur.

Tað var jú ringt at skilja, at yvir 20 mans knappliga ikki vóru longur, og tað í eini tíð, har roknað varð við, at trygdin á sjónum var ein heilt onnur, enn hon var bert fá ár frammanundan, tá slíkar vanlukkur javnan hendu.

Men við Stella Argus fingu vit enn einaferð váttað tær umstøður, sum okkara fólk hevur livað undanfarnu 100 árini.

### 1200 mans farnir á sjónum

Hetta kann váttast við ógvusligum tølum. Frá 1870 og fram til 2. veraldarbardaga fórust um 1.000 mans á sjónum. Ringast var í 1920, tá ið havið tók 62 menn. Undir krígnum mistu vit afturat hesum um 200 mans. Tískil kemur talið uppá 1.200.

Størsta vanlukkan eftir kríggið var Stella Argus. Tað hevur vist bert verið ein størri einstøk skipsvanlukka yvirhøvur, og tað var tá ið Neptun fórst í 1934 við 23 monnum. Samstundis fórst Nólsoy við 20 monnum, og nógvir mans við hesum skipum vóru úr Norðstreymoy.

Tað at missa á sjónum er ein partur av samleikanum hjá føroyingum. Hvussu djúpt hetta stingur fekk eg váttan fyri í 1999, tá ið nevndin í FF vitjaði í Íslandi. Tá var ein partur av skránni at leggja kransar á gravirnar í gamla kirkjugarði í Reykjavík hjá teimum, sum doyðu við Onnu í 1924 og við Acorn í 1928. Tá ið tað fræ ttist um hetta tiltak fyltist flogfarið við avvarðandi, og kransaleggingin gjørdist eitt ræ ttiligt minningarhald. Her vóru fólk við, sum 75 ár frammanundan høvdu sagt pápanum farvæl, og sum tey ikki fræ ttu aftur frá. Tey høvdu øll hesi árini saknað tað ikki at hava tikið ræ ttiligt avskeð við síni næstu, men hetta kundu tey gera nú og fáa frið í sinnið.

Her skal eg nevna eitt bræv, sum eg goymi sum reyðagull. Tað er frá teirri tá 91 ára gomlu Petreu, sum var systir Joakim Hansen, kokkin á Stella Argus. Eg hevði í 2005 eina frásøgn frá henni í FF-blaðnum, har hon greiddi frá teimum av hennara nærmastu, sum hon hevði mist, og var Kim ein teirra. Hon skrivar millum annað:

"Túsund takk fyri, at tú tók hesi upplivilsi í blaðið. Tað er eisini ein lætti fyri meg, at eg kann tosa um hetta uttan at vera ov rørd."

Hon hevur havt tað á nakað sama hátt.

Alt hetta vísti, at hetta vóru viðurskifti og virði, sum taldi nógv hjá okkara fólki. Eg meti tað í dag at vera ikki tann minst týdningarmikli parturin av mínum virki at hava medvirkað til nevna sálarfrið.

Eg havi síðan roynt at niðurskriva lagnusøguna hjá fiskimonnum. Seinast var hetta gjørt við umrøddu greinini um Stella Argus. Hetta er eitt so fangandi evni, at tað gerst ein partur av eins egna samleika.

Eitt endamál við hesi skriving er eisini at fáa víst tí unga ættarliðnum, at teirra vælferð er ikki nøkur sjálvfylgja, og at forfedrarnir hava goldið dýrt fyri hetta.

Tað var tí hugaligt, tá ið ein starvsfelagi fortaldi mær, at hansara 20 ára gamli sonur av sínum eintingum hevði lisið hesa frásøgnina um Stella Argu.

### Møttu síðstu stund við sálarstyrki

Í flestu førum, tá ið skip eru gingin burtur, eru tey horvin uttan at nakar hevur vitað nakað. Tað má tí eisini hava verið sárt hjá teimum avvarðandi at hugsa um, hvussu teirra menn hava upplivað sína síðstu stund. Men tær ábendingar, sum vit hava, vísa, at í eini slíkari støðu hava menn ræ ttuliga víst eina óskiljandi sálarstyrki.

Eg hevði í vár eina frásøgn um vanlukkuna við Acorn í 1928, har sjey mans brendu so illa, at teir doyðu.

Ein av teimum var tann 16 ára gamli Napoleon. Við var eisini pápi hansara Fríðrik Klein.

Í ættini finst brævaskifti, sum var millum Fríðrik og konuna Apoloniu eftir vanlukkuna.

Her skal verða endurgivin frásøgnin hjá Fríðrik um síðstu løtuna hjá Pola, soleiðis sum hann greiðir konuni frá:

"Vores kjære Søn hensov klokken 2 om Dagen, (sum vanlukkan hendi um morgunin). Jeg var hos ham til det sidste Aandedrag, og han sagde til mig: "Gode Fader. Græd ikke, jeg slipper til Gud. Trøst Moder, Gud trøste hende", bad han,

→